# Ungdómsdok. til sjónvarp til útbjóðingar

**Arbeiðsheiti:** Ungdómsdok
**Miðil:** Sjónvarp/net/sosialir miðlar
**Hvat:** Ein sjónvarpssending í sjónvarpinum, á netinum ella sosialu miðlunum
**Longd:** 10 - 20 minuttir
**Staðseting:** Mentan, Kringvarp Føroya
**Redaktionell ábyrgd:** Mentan

## LÝSING

Kringvarp Føroya bjóðar alment út til framleiðslulið at gera fýra-seks sjónvarpssendingar til ungfólk. Sendingarnar skulu verða tilætlaðar ungdóminum og skulu kunna sendast bæði í sjónvarpinum og á netinum/sosialu miðlunum.

Hevur tú hugskot til slíka framleiðslu, ert tú vælkomin at senda títt boð inn til Kringvarp Føroya.

## KRØV TIL TILBOÐSGEVARA

Greið lýsing av hugskotinum og sendingini og hvussu tilfarið skal miðlast til málbólkin. Framleiðslan skal eisini hava gott føroyskt mál.

## KRØV TIL TILBOÐIÐ

Ein lýsing av sendingini. Hvat hon snýr seg um, hvussu hon er uppbygd, og hvussu tú kundi hugsað tær at lagt sendingina til rættis til vanligt flow tv og til netið.

## KRINGVARP FØROYA KANN VEITA

- Myndafólk
- Útgerð
- Klipping
- Atgongd til savn
- Grafikara
- Netfólk
- Myndaviðgerð
- Ljóðeftirviðgerð
- Redaktør

## FÍGGING

Løn/samsýning sambært avtalu

KVF tilskilar sær rætt til at leggja dent á yrkisføri og veitingartrygd.

KVF tilskilar sær somuleiðis rætt at vraka øll innkomin tilboð.

Freistin at bjóða seg fram at gera dokumentarar er 1. sept 2019.

Umsókn skal sendast til utbod@kvf.fo.

Hevur tú spurningar, kanst tú venda tær til Kára Sólstein, leiðara á Mentan, tlf. 296634, karisol@kvf.fo

KVF hevur eitt skipað samstarv við framleiðslueindir uttan fyri stovnin, bæði feløg og einstaklingar. KVF bjóðar tí út sendingar sambært viðtøkum í public service sáttmálanum.

KRINGVARP FØROYA